Nr. 2 17. mars 2011

**Reglugerð um broyting í reglugerð um treytir at nýta radioútbúnað í radiotænastu á sjónum (siglingaradiopróvbrøv)**

§1

Í reglugerð nr. 2 frá 16. mai 2004 um treytir at nýta radioútbúnað í radiotænastu á sjónum (siglingaradiopróvbrøv" verða gjørdar hesar broytingar:

1) §3, stk. 1, nr. 3 verður orðað soleiðis:
   3) "LRC radiopróvbræv til nýtslu av siglinga MF-, HF- og VHF-GMDSS-radioútgerð við fylgisveinasamskifti, men uttan radiotelex. "
2) Í Fylgiskjali 1 verður **"5. LRC-radiopróvbræv við ískoytisroynd"** strikað.
3) Í Fylgiskjali 1 verður í **" 4. Royndarkrøv fyri at fáa LRC-radiopróvbræv"** sett inn nýtt litra g) undir "2. Nýtsla av", ið er soljóðandi:

"h) Inmarsat útbúnaði"

Og nýtt litra g) undir pkt. "3. Verkligir framferðarhættir og handfaring av", ið er soljóðandi:

"g) Grundreglur fyri fylgisveinatænastu, at nýta Immarsat C útbúnað og skrivlig orðing á viðkomandi enskum máli."

§ 2

Henda reglugerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fjarskiftiseftirlitið, 17. mars 2011

**Jógvan Thomsen (sign.)**
stjóri

/Kai Vágfjall (sign.)